gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Búskaparkanning

## *Oddagrein*

Landsstýrið vil nú hava ein bólk ella eina nevnd at kanna føroyska búskapin fyri at fáa greiðu á skiftistíðini — onkur hevur nevnt IMF. Sjálvsagt er altíð gott at fáa so nógv tilfar á borðið, sum møguligt, tá ein stór avgerð skal takast. Men spurningurin er, um ikki samgongan við hesum nýggju ætlanum gevur kritikarum av búskaparliga arbeiðnum í samband við Hvítubók rætt í sínum atfinningum.

Vit hava havt ein búskaparpart í Hvítubók, ið ikki var framúr greiður, og landsstýrið hevur fingið atfinningar viðvíkjandi framløguni av hesum arbeiði. Her á hesum stað var millum annað sett spurnartekin við, hví útrokningarnar fyri skiftistíð í Hvítubók ikki vóru styttri enn 15 ár. Andstøðan setti somu spurningar viðvíkjandi skiftistíðarútrokningunum, og sera løgið er, at embætismenn, ið hóast alt eru serfrøðingar á økinum, ikki hava sett spurnartekin við útrokningar, ið hava víst seg at vera nakað burtur frá veruleikanum fyri ikki at siga naivar, nú onkur landstýrismaður hevur nýtt hettar orðið í seinastuni.

Vit hava verið vitni til framløgur kring alt landið, har fólk sóu telduuppvísing við búskapartøllum, har fundarfólkið ella rættari sagt áskoðarnir fingu høvi at velja sær eina skiftistíð fyri so at síggja grafar í fleiri litum yvir gjaldsjavna og øðrum. Um hettar arbeiðið var eftirfarandi, so átti at verið skjótt at trýst fýra ár inn í telduna fyri at sæð, á hvørjum støði framtíðar sjálvberandi búskapur Føroya hevði verið á. Nakað annað er so, at gjaldsjavni og handilsjavni, ið ivaleyst verður negativur í ár, ikki eru góð mát fyri landskassans inntøkur, og ynski landstýrisins um búskaparkanningarnevnd er kanska ein ásannan av hesum.

Útyvir at landsstýrið ikki tók kritikkin av búskaparpartinum av Hvítubók til eftirtektar, ella framløguna av hesum, so er enn meira hugstoytt, at sama landsstýri fortelur fólki, at danskarar skulu grundgeva fyri fýra ára skiftistíð. Er hettar ikki heldur løgið, aftan á milliónaupphæddir eru nýttar til kunning og kanning sum liður í fullveldisætlanini?

Ein sjálvberandi búskap fáa vit føroyingar í morgin, um vit vilja, men spurningurin er bert, hvat livistøðið í hesum sjálvberandi búskapi verður. Sjálvberandi búskapur merkir ikki neyðvendigvís við núverandi støði, hóast landsstýrið tykist vera av hesari hugsan. Hettar er eitt sindur óskilligt, tá hugsað verður um, at landstýrismenn hava høvi at ráðføra seg við hópin av óiva dugnaligum búskaparfrøðingum í umsitingini. Hesir høvdu óiva skjótt klárað at roknað út, hvat livistøðið í sjálvberandi føroyska búskapinum hevði verið aftan á eina fýra ára skiftistíð, uttan at IMF ella onkur annar nýtast at vera eftirspurd.

Spurningurin er, um ikki øll gongdin í fullveldisviðgerðini átti at verið endurskoðað í einum metaforiskt sæð edrúiligum ljósi, soleiðis, at borgarin og politikarar til eina og hvørja tíð hava eitt trygt og vælgrundað búskaparligt støði at taka støðu útfrá, óansæð politiskt rák ella búskaparligan móta.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Skiftistíðin einaferð enn

Hin nógv umrødda skiftistíðin verður brúkt umaftur og umaftur av landsstýrinum í rættvísgerðini av fullveldismálinum, og skal varðveita ynskidreymin hjá teim trimum landsstýrisflokkunum.

Ikki minni hevur hon verið brúkt, tó í tí førinum í negativum týdningi – tey 4 árini - í ummælinum av tí ”harðrendu” viðferð, sum danska stjórnin hevur givið okkum samb. landsstýrismanninum í sjálvsstýrismálum, Høgna Hoydal.

At landsstýrið veruliga hevur hildið, at alt fór at ganga sum eftir ánni, tá teirra krøv um fullveldistreytir (tí annað kann tað væl ikki kallast) vóru løgd fram á samráðingarborðið, er ófatiligt og veruleikafjart. Alt skuldi bera til, og ávaringarnar frá Sambandsflokkinum vóru kveistraðar til viks við yvirberandi smíli.

Tað skal sláast fast, at Sambandsflokkurin hevur ongantíð ivast í, at vildu vit loysa, so kundu vit loysa, men at alt fór at vera ókeypis fyri okkum og fyri danskan pening, tað er ongantíð komið okkum til hugs.

**Skiftistíðin sum prógv**
Serliga seinastu tíðina, nú veljarakanningarnar vísa eina aðra mynd, enn landsstýrið hevði ætlað, nevniliga at teir ikki hava meirilutan av Føroya fólki við sær, er alt meira og meira sjónliga vorðið vent og snarað soleiðis, at nógv umrødda skiftistíðin skal ***prógva***, at fólkið vil hava fullveldi. Skiftistíðin skal bara vera longri enn tey 4 árini, sum danska stjórnin gongur við til!

Hatta kann kann ikki annað enn kallast ”manipulatión”, tí hatta er ikki allur sannleikin!

Haldi meg minnast, at hin fyrsti at brúka argumentið var løgmaður, Annfinn Kallsberg, aftaná fyrstu veljarakanningina. Síðan tá hevur tað verið at hoyrt í heilum.

**Leiðandi spurningar**
Landsstýrismaðurin í sjálvsstýrismálum hevur



einaferð í tinginum víst á nøkur dømi, hvussu ”leiðandi spurningar” kundu brúkast ella misbrúkast, og hann vísti á eitt dømi um kríggið í Vietnam, og hvussu ein kundi fáa fólk at svara játtandi uppá spurningin, um amerikanar skuldu halda fram við at bumba í Vietnam, sjálvt um teir meintu tað øvugta. Kynstrið var at venda spurningin soleiðis, sum tú vildi hava svarið.

Setur tú spurningin: ***Skulu vit hava eina skiftistíð uppá 4 ár ella 15 ár?*** ber væl til at fáa svarið ***15 ár.***

Men, vit skulu ikki gloyma, at endamálið við skiftistíðini er ***fullveldi,*** og tá eiga øll sambandssinnaði fólk at vera varin og at svara ***nei,*** bæði tá talan er um 4 ella 15 ár.

**Løgmaður og heimildir**
Annars kann tað undra, at løgmaður enn heldur seg hava heimild til at samráðast við danir um fullveldi, tí kanningar vísa jú, at hann hevur ein meiriluta av Føroya fólki ímóti sær. Talan er um týdningarmikið mál og snýr seg um framtíð Føroya, og sambært tí løgmaður alment hevur sagt, so hevur hann onki serligt vald, tí honum tørvar heimildir til so gott sum alt, um ikki rætturin hevur talað fyrst.

Um so er, so kundi eitt hugskot verið at spart løgmanstarvið burtur og brúkt tann peningin til okkurt annað, tí tá kundi onkur annar lættliga tikið sær av tí uppgávuni.

**Lisbeth L. Petersen**
**løgtingslimur**

# Maersk Air slær egið met

*Ferðafólkatalið á uttanríkisrutunum hjá Maersk Air vaks fjórðu vikuna á rað og setti aftur nýtt met*

Maersk Air boðar í tíðindaskrivi frá, at fjórðu viku á rað setti felagið í viku 27 nýtt ferðafólkamet á uttanríkisrutunum.

Sagt verður, at hesa vikuna ferðaðust 25.199 ferðafólk við Maersk Air. Tað er ein vøkstur upp á 21% í mun til somu viku í fjør.

Tað er tó ikki bara á uttanríkisrutunum samanlagt, at met verða sett. Eisini á teimum einstøku rutunum er vøksturin so stórur, at hann setir met. Nevndar verða ruturnar København - Kristiansand, København - Lissabon og København Venezia.

Sagt verður, at tá komandi nýggju ruturnar koma upp í ferðaætlanina, verður ferðafólkatalið væntandi enn størri. Nýggju ruturnar, nevndar verða, eru til ávikavist Kairo og Istanbul.

Upplýst verður ikki, nær tær ruturnar byrja. Men av upplýsingardeildini hjá Maersk Air verður sagt, at tað verður í samband við vetrarferðaætlanina. Vetrarferðaætlanin kemur í gildi 28. oktober, men ikki er vist, at nýggju ruturnar byrja beinaveg kortini, verður sagt hjá Maersk Air í København.

**ej**

# Heima í dýrdini

Við glógvandi eygum og rødd og penni, sum royndu at sannføra, segði hann frá tí landi, hann mangan vitjaði og tyktist at hava mist hjarta sítt til. Flestu mundu meta hesar frásagnir ynskidreymar at vera.

Hann tosaði og skrivaði um eitt frælst føðiland, ikki øll skiltu, nøkur spottaðu og tosaðu aftur um dreymaverð.

Ein dagin, merktur av tonn tíðarinnar, møttust hann og Frelsarin – og teir gjørdust vinir. Einki varð sum áður, hann dvøldi við føtur Meistarans. Vit sóðu hann á sjónvarpsgugganum á fundi í heri frelsarans og samkomu hvítusunnumanna, hendan blíða, glaða lærusveinin.

Fekst tú orð á hann, á arbeiðsplássi hansara ella á gøtuni, so var tað altíð tað góða orðið, sum fylgdi tær.

Dreymar ella ikki – í dag eru teir saman, Meistarin og Arnbjørn. Saman í dýrd, sælu og frælsi, sum ikki kann metast við sjálvt fagrastu dreymar hann hevði. Á sæla møti hvørs úrslit helt, tá alt annað svíkti.

Hvussu løtan enn var inni á Sundi, so var hann ikki einsamallur. Jesus var hjá honum við tí friði, sum lyftir av pínu, rekur burtur ótta og stillar sinni. Hvat teir tosaðu um hesa løtu, vita vit ikki enn. Men tað vóru ikki dreymar, men veruleikin, sum møtti Arnbjørni, tá hann á ørmum Frelsarans varð borin heim í dýrdina.

**Vit møtast aftur!**
**Jenis**



gult cyan magenta svart



# Ocean Warrior búgvið til bardaga

*Við píkatráði, vatnkanónum, feitti og Wagner tónleiki er skipið hjá She Shepherd búgvið til bardaga við føroysku myndugleikarnar*




John Johannessen

Paul Watson, skipari á Ocean Warrior, hevur gjølla lagt til rættis, hvussu hvør einstakur av manningini skal bera seg at, kemur tað til samanbrestir millum Sea Shepherd og føroysku myndugleikarnar.

Hvør maður hevur sín egna post, hann skal verja, um føroysku myndugleikarnir royna at koma umborð á skipið.

Hetta sigur John Vidal, umhvørvisblaðstjóri á enska blaðnum, The Guardian. Hann var við Ocean Warrior, tá tað seinasta fríggjadag kom til Føroya. John Vidal fór tó mánakvøldið í land í Føroyum, fyri at hoyra føroysku meiningina um grindadráp.

**Víkir ikki fyri myndugleikunum**
John Vidal sigur seg vera vísan í, at Paul Watson ikki fer at víkja fyri føroysku myndugleikunum, um teir til dømis forða honum í at koma framat einum grindadrápi.

– Leggja føroysku myndugleikarnir seg í vegin fyri Watson, finnur hann uttan iva ein útveg. Watson er ikki maðurin, ið bara gevst á hond, sigur Vidal.

Enski blaðmaðurin sigur, at Paul Watson neyvt hevur útgreinað, hvat hvør av manningini skal gera fyri at verja skipið móti føroysku myndugleikunum. Nøkur fólk skulu standa við vatnkanónirnar umborð, nøkur skulu leggja píkatráð kring skipið, nøkur skulu stoyta feitt yvir skipið og nøkur skulu syrgja fyri at Wagner tónleikur og hvalaljóð hoyrist úr hátalarunum á dekkinum.

**Skal virka hóttandi**
Wagner tónleikurin, saman við hvalaljóðunum og svartmálaða skipinum við sjórænaraflaggi á stong, skal sambært John Vidal, virka ræðandi.

– Hinvegin kann hetta eisini sýnast einfalt. Men, tað kann sigast, at talan er um krígsførslu, ið er at líkna við miðaldar krígsførslu, sigur John Vidal.

Enski blaðstórin er tó sannførdur um, at miðlarnir eru største vápnið hjá Watson. Watson veit nevniliga, at tað beinan vegin verður borið kring heimin, fremja myndugleikarnir nakara atsókn móti skipinum ella honum sjálvum.

John Vidal veit, sum blaðmaður, at miðlarnir í hesum føri verða nýttir. Men hann leggur dent á, at stórur munur at á at verða nýttur og at verða misnýttur.

– Eg brúki teir og teir brúka meg, soleiðis er tað við øllum miðlaarbeiði, ger Vidal greitt.

**Trý skip eftir Watson**
Sosialurin skilir, at føroysku myndugleikarnir, síðani Watson seinasta fríggjadag kom til Føroya, hava havt trý skip liggjandi og eygleitt Ocean Warrior við hóskandi frástøðu.

Eitt av skipunum hjá myndugleikunum er ein trolari. Eitt annað er eitt vaktarskip – helst Tjaldrið. Tað triðja er danska vaktarskipið, Hvidbjørnen.

Hesi trý skipini, skulu sambært tí, Sosialurin hevur fingið at vita, leggja seg fyri Ocean Warrior, um grind verður.

Tað ber ikki til, at fáa hesi tíðindini váttað frá fútanum, ið er einasti myndugleiki, sum ger viðmerkingar viðvíkjandi Watson.

Fútin ger bert greitt, at Watson í løtuni ikki er í Føroyum, men at løgreglan er fyrireikað, um hann kemur aftur.

# Herman Oskarsson stjóri á Hagstovuni

Herman Oskarsson er nú stjóri á Hagstovuni. Hetta gjørdi Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum av í gjár.

Herman Oskarsson er 47 ára gamal. Hann er útbúgvin sum cand.polit og hevur seinastu árini starvast sum fulltrúi á Hagstovu Føroya, skrivari í Búskaparráðnum og seinasta árið hevur hann verið virkandi stjóri á Hagstovu Føroya



*Herman Oskarsson*

# Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 16. juli kl. 16.00 heldur Magnus Jørgensen fyrilestur um kirkjusøgu (Innan– og uttan kirkjuligar rørðslur) í konfirmantstovuni í Vesturkirkjuni.

Um viðrar heldur Heini F. Petersen fyrilestur um Mikkjal á Ryggi sunnudagin 16.juli kl. 16.00 í skúlanum í Gásadali. (Nærri boð fáast á tlf. 321132 ella 314031 leygardagin)

Framsýningin hjá J.P. Gregoriussen, arkitekti um kirkjurnar í Føroyum verður í fimleikahøllini í Vestmanna skúla frá fríggjadegnum 14. juli kl. 19.00 til 21. juli.

# Høgni setir ólavsøkuna

*Varaløgmaður, Høgni Hoydal, verður ólavsøkurøðari í ár*

Rúnar Reistup

Høgni Hoydal verður maðurin, sum ólavsøkuaftan fer at traðka upp á røðarapallin á Vaglinum og seta ólavsøkuna.

Varaløgmaður, ið hevur fingið heiðurin at halda ólavsøkurøðuna á hesum sinni, er í løtuni staddur í Grønlandi, har hann umboðar Føroyar á hátíðarhaldi í sambandi við 1000 ára dagin fyri at kristindómurin kom til Grønlands.



*Høgni Hoydal*

Tað er Tórshavnar Ítróttarráð, sum hvørt ár velur ein at heita á um at halda ólavsøkurøðuna. Í fjør var tað ungi sjálvstýristingmaðurin Jákup Sverri Kass, ið helt røðuna, og nú er tað so tann nakað eldri, men kortini lutfalsliga ungi, sjálvstýrismálaráðharrin, ið fer at seta tjóðarhátíðarhaldið.